NORĐOYA SPARIKASSI

# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2007



# RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2007

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 57.523 | 37.775 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 21.647 | 11.260 |
| | Netto rentuinntøkur | 35.876 | 26.515 |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum | 2.355 | 463 |
| | Kostnaður og provisjónsinntøkur | 5.224 | 3.605 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisjón | 886 | 176 |
| | Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 42.569 | 30.407 |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 3.057 | -4.255 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 211 | 217 |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 25.548 | 17.267 |
| | Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 1.381 | 725 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 10 | 100 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | -1.276 | 1.079 |
| | Úrslit áðrenn skatt | 20.174 | 7.198 |
| | | | |
| | Skattur | 3.631 | 1.356 |
| | | | |
| | Hálvársúrslit | 16.543 | 5.842 |

# FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI 2007

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | Ogn | | |
| | Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankanum | 28.836 | 22.200 |
| | Ogn hjá fíggjarstovnum | 50.276 | 33.786 |
| | Útlán | 1.690.575 | 1.257.577 |
| | Lánsbrøv | 86.763 | 174.915 |
| | Partabrøv | 62.322 | 61.859 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 3.900 | 0 |
| | Kapitalpartur í tilknýttum fyritøkum | 11.448 | 10.985 |
| | Ítøkiligar ognir | 25.850 | 13.089 |
| | Onnur ogn | 6.726 | 3.163 |
| | Ogn tilsamans | 1.966.696 | 1.577.574 |
| | | | |
| | Skuld og eginpeningur | | |
| | Skuld til fíggjarstovnar | 150.000 | 0 |
| | Innlán | 1.461.588 | 1.271.842 |
| | Onnur skuld | 25.480 | 14.002 |
| | Avsetingar til útreiðslur | 2.834 | 2.741 |
| | Skuld tilsamans | 1.639.902 | 1.288.585 |
| | | | |
| | Eginpeningur | 310.251 | 283.147 |
| | Hálvársúrslit eftir skatt | 16.543 | 5.842 |
| | Eginpeningur tilsamans | 326.794 | 288.989 |
| | | | |
| | Skuld og eginpeningur tilsamans | 1.966.696 | 1.577.574 |
| | | | |
| 5 | Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna | | |
| | Ábyrgdir og aðrar skyldur | 305.471 | 184.812 |

# VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | | |
| | Renta av innistandandi í peningastovnum | 1.376 | 1.005 |
| | Renta av útlánum | 54.986 | 34.116 |
| | Renta av lánsbrøvum | 1.161 | 2.654 |
| | Rentuinntøkur tilsamans | 57.523 | 37.775 |
| | | | |
| 2 | Rentuútreiðslur | | |
| | Renta til peningastovnar | 2.086 | 0 |
| | Renta til innlán | 19.448 | 11.195 |
| | Renta til ábyrgdarapening | 113 | 65 |
| | Rentuútreiðslur tilsamans | 21.647 | 11.260 |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | | |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum | -659 | -2.224 |
| | Virðisjavnan av partabrøvum | 3.673 | -2.383 |
| | Virðisjavnan av gjaldoyra | 43 | 352 |
| | Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra tilsamans | 3.057 | -4.255 |
| | | | |
| 4 | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | | |
| | Løn, eftirløn og samsýning til stjórn, nevnd og umboðsráð | 1.349 | 947 |
| | Starvsfólkalønir | 7.876 | 5.928 |
| | Eftirløn til starvsfólk og løn til eftirlønt starvsfólk | 1.198 | 1.080 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 724 | 639 |
| | Útreiðslur til starvsfólk tilsamans | 11.147 | 8.594 |
| | | | |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 14.401 | 8.673 |
| | Útreiðslur til starvsfólk og umsiting tilsamans | 25.548 | 17.267 |
| | | | |
| 5 | Ábyrgdir og aðrar skyldur | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 290.455 | 161.830 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 15.016 | 22.982 |
| | | 305.471 | 184.812 |

# LYKLATØL 1. HÁLVÁR

| Lyklatøl | 2007 | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 17,0 | 20,0 | 27,1 | 28,3 | 27,2 |
| Kjarnukapitalprosent | 17,0 | 20,0 | 27,1 | 28,3 | 27,2 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 6,3 | 2,5 | 3,9 | 4,5 | 5,5 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 5,2 | 2,0 | 3,1 | 3,6 | 4,4 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,79 | 1,38 | 1,53 | 1,63 | 1,79 |
| Rentuváði | 1,1 | 2,5 | 1,5 | 1,3 | 2,7 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 117,1 | 100,7 | 111,3 | 101,9 | 96,2 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 20,4 | 85,7 | 73,9 | 149,3 | 185,0 |
| Stórir kundar tilsamans | 57,2 | 49,2 | 22,8 | 37,9 | 51,2 |
| Burturleggingarprosent | 1,1 | 1,7 | 2,9 | 3,4 | 2,9 |
| Hálvárstaps- og burturleggingarprosent | 0,0 | 0,1 | 0,2 | 0,2 | 0,0 |
| Hálvársútlánsvøkstur í árinum | 12,4 | 13,2 | 8,0 | 1,1 | 5,8 |
| Útlán i mun til eginpening | 5,2 | 4,4 | 3,9 | 3,6 | 3,6 |

# ROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2007 HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA

Norðoya Sparikassi hevði fyrra hálvár 2007 eitt úrslit áljóðandi 16,5 mió. kr. eftir skatt í mun til 5,8 mió. kr. fyrra hálvár 2006. Hetta eru 10,7 mió. kr. hægri enn somu tíð í fjør.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar hjá sparikassanum fyrra hálvár vóru 35,9 mió. kr. og er hetta ein vøkstur uppá 9,4 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2006, tá netto rentuinntøkurnar vóru 26,5 mió. kr. Vøksturin kemst í høvuðsheitinum av, at útlánsvirksemi sparikassans er vaksið munandi seinasta árið. Útlán og burturleggingar vóru í ár 117,1% í mun til innlán. Somu tíð í fjør vóru útlán og burturleggingar 100,7% í mun til innlán.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkur sparikassans fyrra hálvár vóru 42,6 mió. kr. í mun til 30,4 mió. kr. sama tíðarskeið í 2006, ið er ein vøkstur uppá 12,2 mió. kr. Vøksturin kemur millum annað av, at sparikassin hevur fingið vinningsbýti av partabrøvum uppá 2,4 mió. kr. í mun til 0,5 mió. kr. fyrra hálvár 2006. Eisini stavar ein partur av vøkstrinum frá øktum provisjónsinntøkum frá ábyrgdum, ið seinasta árið eru øktar við 128,6 mió. kr.

## Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.a.

Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra o.a. gjørdist eitt avlop uppá 3 mió. kr. fyrra hálvár 2007, í mun til eitt hall uppá 4,3 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Hetta viðførir eina nettoávirkan á raksturin uppá 7,3 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2006.

## Útreiðslur

Økta virksemið hjá sparikassanum, við m.a. tveimum nýggjum deildum, hevur havt við sær, at útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 8,2 mió. kr. hægri fyrra hálvár 2007 enn fyrra hálvár 2006. Útreiðslur til starvsfólk og umsiting vóru 25,5 mió. kr. fyrra hálvár í ár í mun til 17,3 mió. kr. fyri sama tíðarskeið í fjør.

## Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar vóru ÷1,3 mió. kr. í mun til 1,1 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Hetta viðførir eina nettoávirkan uppá 2,4 mió. kr. samanborið við fyrra hálvár 2006.

## Fíggjarstøðan

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar nú við 1.967 mió. kr. í mun til 1.578 mió. kr. fyrra hálvár 2006. Hetta er ein vøkstur uppá 24,7%. Innlánið er nú 1.462 mió. kr. í mun til 1.272 mió. kr. fyrra hálvár 2006, sum svarar til ein vøkstur uppá 14,9%. Útlánið er nú 1.691 mió. kr. í mun til 1.258 mió. kr. fyrra hálvár 2006, svarandi til ein vøkstur uppá 34,4%.

Eginpeningur sparikassans er nú 326,8 mió. kr., og er farna árið øktur við 37,8 mió. kr., ið er ein vøkstur uppá 13,1%. Eginognin er nú 16,6% av samlaðu fíggjarstøðuni í mun til 18,3% fyrra hálvár 2006.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldføri sparikassans er nú 232 mió. kr. í mun til 269 mió. kr. í 2006. Gjaldførið er 35% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans, lógin krevur 15%, og av samlaðu skyldum sparikassans 12%, her krevur lógin krevur 10%.

Solvensur sparikassans er 17,0%, í mun til 20,0% fyrra hálvár 2006. Lógin krevur 8%. Orsøkin til fallið í solvensprosentinum er økta virksemið hjá sparikassanum.

## Útlit seinna hálvár

Sparikassin væntar at seinna hálvár 2007 verður áleið tað sama sum fyrra hálvár 2007.